## Nýggjur formaður í Fram

Á aðalfundi hjá felagnum herfyri takkaði Magnus Fuglø fyri seg eftir drúgt áramál sum formaður í Fram. Nýggjur maður í sessinum er Tórarin Hentze úr Havn. Afturat honum eru Áki Mortensen, Jákup Petur Eliasen, Rói Jacobsen og Fróði Danielsen. Eitt tað fyrsta stigið, sum nýggja nevndin tók, var at kjósa fyrrverandi formannin sum heiðurslim í felagnum. Venjaraspurningurin hjá felagnum er eisini avgreiddur, og verður tað John Eystberg, ið heldur fram í hesum starvi. Afturat sær hevur hann Jón Brekku.



## Claus tapti

Blackpool spældi ímóti Bristol City í næstbestu ensku fótbóltsdeildini um vikuskiftið, og hesaferð endaði tað við tapi hjá Blackpool. Claus Bech Jørgensen var á liðnum frá byrjan, og hann spældi til ein hálvur tími var eftir. Tá varð hann skiftur út. Eitt mál kom í dystinum, og tað skoraði Bristol City eftir 20 minuttir. Fleiri enn 15.000 fólk hugdu eftir dystinum.

Fleyr-ÍF 2-3 (25-21, 23-25, 25-20, 14-25, 12-15):

# ÍF vil hava gull



*Fuglfirðingar hava eitt sera sterkt lið í bestu deildini hjá monnum í flogbólti, og teir nærkast alsamt oddinum. Spennandi verður at fylgja gongdini, restina av kappingini*

Við einum dysti á láni, hava harrarnar úr Fuglafirði eitt sera gott útgangsstøði til ein endaspurt í FM stríðnum, sum tykist vera alt meira spennandi. So at siga øll lið eru før fyri at taka stig frá hvør øðrum, og tað er nærum finalukendur spenningur um hvønn einstakan dyst.

Sunnudagin vitjaðu harrarnar úr Fuglafirði í Havn, har Fleyr vóru vertir, og eisini hesin dysturin bleiv ein sannur gysari av einum 5 settara.

### Enn ein 5-settari

Dysturin gjørdist eisini sera spennandi og skuldu heili 5 sett til fyri at avgera hann. Fyrsta sett vann Fleyr 25-21 og vóru teir eisini frammanfyri frá byrjan til enda.

Næsta sett høvdu ÍF munin, og vunnu settið 25-23.

Í triðja settið tóktist túrurin aftur at vera komin til Fleyr at vinna, og endaði settið 25-20 til harrarnar úr Havn.

Nú stóð á gomlum nøglum, og ÍF reistist seg veruliga og vístu meistarakent spæl, og settu vertirnar uppá pláss við at vinna settið 25-14.

### Avgerandi settið

Í fimta og seinasta settinum, var ÍF frammanfyri í byrjanini, men Fleyr kom sterkt aftur, og javnaði eitt skifti til 8-8. Haðani fylgdust liðini nærum hond í hond upp til støðuna 12-12, haðani ÍF síðani drógu longra stráðið og vunnu settið 15-12, og harvið eisini dystin 3-2.

### Kapping um plássini

Hesin sigurin á útivølli hevur sostatt við sær, at ÍF liðið er komið uppá næstfremsta pláss í bestu flogbóltsdeildini hjá monnum, og liggja teir bert eitt stig aftanfyri Mjølnir, men Fuglfirðingar hava spælt ein dyst færri enn kappingarneytar sínir, so kappingin sær út til at gerast sera spennandi, nú bert seks dystir eru eftir at spæla.

**-niels**

ÍF-TB 3-1 (23-25, 25-16, 26-24, 25-16):

# Aftur 3-1 til ÍF

**Seinast damurnar úr Fuglafirði møttu TB, vunnu tær 3-1 suðuri í Trongisvági, og hetta hendi aftur sunnudagin á Kambsdali, tá ungu tvørádamurnar vóru á vitjan við einum skerdum liði**

FLOGBÓLTUR
*Niels Petersen*
*niels@sosialurin.fo*



*Katrin Petersen sæst her í dysti. Hon er ein av teimum mongu ungu kreftunum á TB liðnum, ið hevur ein miðalaldur upp á bert 17,8 ár*

Í fyrsta settinum byrjaðu TB kvinnurnar betur og vunnu tað eisini 23-25. Eftir hetta tóktust ÍF kvinnurnar at taka seg saman og megnaðu tær eisini at vinna næsta sett 25-16. ÍF venjarin valdi at nýta ungu Urd Traðará allan dystin, og sigast má at hon stóð seg avbera væl.

Triðja settið í dystinum vísti seg at vera eitt sera spennandi eitt av slagnum. Tí við støðuni 24-23 til gestirnar av Tvøroyri, stóðu TB kvinnurnar til at hava settbólt, men ÍF venjarin bað um time-out og so vendi alt. Blaðungu tvørágenturnar vóru sum lammaðar eftir timeoutið, og ÍF skoraði trý løtt stig, og tóku harvið eisini triðja settið.

Fjórða settið var eins og hini frammanundan, merkt av fjálturstungnum spæli, og nógvum feilum, men ÍF vann tað sikkurt, og harvið eisini dystin, 3-1.

### Bjørt framtíð fyri framman

Ikki bert ÍF hevur íslett av ungum leikarum. Nærum alt TB liðið er blaðungt, og hava tær ein miðalaldur uppá 17,8. Flestar av teimum spæla á kvinnuunglingaliðnum hjá felagnum, so tað sær kanska eitt sindur dapurt út í løtuni, men framtíðin hevur óivað eitthvørt spennandi at bjóða uppá.

### Skerdir gestir

TB vóru tíðuliga merktar av at nakrar av eldru leikarunum ikki vóru við á Kambsdali. Onkrar teirra eru givnar í felagnum, og Sólva Dimon var ikki tøk heldur, men Sára Strøm var við aftur, og hennara partur lá ikki eftur.

Nú eru tveir triðingar av kappingini lagdir afturum, og stigini eru hálveraði, so man kann næstan siga, at tað er ein nýggj kapping, ið nú byrjar.

SÍ-KÍF 3-0 (25-16, 25-09, 25-22):

# Sannførandi SÍ sigur

**Kvinnuliðið hjá SÍ endaðu næsta partin av kappingini í Meistaradeildini sum oddalið, hetta aftaná ein sannførandi sigur móti enn einum ungum KÍF liði**

FLOGBÓLTUR
*Niels Petersen*
*niels@sosialurin.fo*

Hesi bæði liðini eru javnt ung sum lið í meistaradeildini, men í mun til KÍF má sigast at SÍ hevur verið heppið við at hildið uppá teirra ungu og evnaríku leikarar. KÍF hevur mist nógv fólk, og hetta ávirkar teirra spæl nógv.

Hóast fyrsta sett byrjaði rímuliga javnt, sást stórur munur á liðunum. SÍ leikararnar megnaðu at spæla á einum væl hægri støðið, men nakað nógvir feilir, bæði í servum og álopi, settu tó sín dám á dystin. Hóast hesa sannroynd, eydnaðist tað sørvágskvinnum at halda munin og vunnu tær fyrsta settið 25-16.

Í øðrum setti kemur SÍ á odda heili 10-0, og tá er settið í roynd og vera avgreitt. SÍ venjarin vekur síðani at seta yngri kreftir inn, og tær svíkja ikki givið álit, og eru við til at avgera settið fyri heimaliðið. Heili 25-09 endar settið, og SÍ sær øðiliga sterkt út í løtuni, og mugu teljast sum absoluttir favorittar til FM heitið og møguliga eisini steypafinaluvinnarar um miðjan næsta mánað.

Triðja settið byrja kvinnurnar úr Kollafirði væl betur, og í løtum vísa tær sera gott spæl í álopinum. Tað gevur sjálvsálit, og tá feilirnir hjá SÍ gerast heldur nógvir, sær tað dapurt út hjá heimaliðnum, men við hepnum útskiftingum, eydnast tað SÍ venjaranum at venda gongdini í dystinum, so at tær móti endanum fáa koppa gestunum og harvið vinna settið og dystin. Eitt skifti í triðja setti vóru KÍF á odda 17-15, men SÍ kom sterkt aftur og vann 25-22.